# Losjan fer um marknastein

**Mikudagin 1. mai vóru hundrað ár liðin, síðani fólk í Havn tóku stig til at stovna Losjuna "Støt Viljen", sum er partur av altjóða brøðralagnum Good Templars. Mánadagin verður stór myndaframsýning opin fyri almenninginum**

LOSJAN
*Stefan í Skorini*




*Jóhannes C. Mikkelsen, vanliga nevndur Lill, man var ein av teimum elstu limunum í Støt Viljen. Hann hevur verið við til at mynda felagsskapin í Føroyum MYND: Jens Kr. Vang*

Losjan hátíðarheldur í hesum døgum, at hundrað ár eru liðin, síðani átta kvinnur og fimm menn tóku stig til at stovna losjuna "Støt Viljen" í Føroyum. Hon er partur av International Organisation of Good Templars, sum er ein heimsumfevnandi rørsla.

Tað var danin Laurits Henriksen, sum var stovnari av Losjuni. Hann hevði snikkaraverkstað í bygninginum á Tinghúsvegnum, har Losjan heldur til í dag.

Í sambandi við hundrað ára dagin hava limirnir sett upp eina myndaframsýning, ið lýsir hesi hundrað árini við losjuni. Á framsýningini er eitt ótal av áhugaverdum myndum at síggja umframt aðrar lutir, sum eru savnaðir gjøgnum árini. Framsýningin verður opin fyri almenninginum mánakvøldið frá klokkan 20 til 22.

Formaðurin í losjuni er Jákup Lindenskov. Hann sigur, at losjan hevur trý aðalmál. Tey eru avhald frá rúsdrekka, brøðralag og at arbeiða fyri friði og semju.

Rørslan varð stovnað í USA í 1853, og hon hevur síðani breitt seg til flestu londini í heiminum.

## Áhugavert flagg

Umframt myndirnar er eisini eitt áhugavert flagg á framsýningini. Tað er flaggið hjá losjuni Støt Viljen. Hetta bláa flaggið úr silki fekk losjan 30. apríl í 1933, og tað varð gjørt í Danmark. Tað kostaði 335 krónur at framleiða. Lias í Rættará var ein teirra, ið tók stig til at fáa flaggið gjørt.

Tá flaggið kom til Føroyar var stórt hátíðarhald. Jákup Lindenskov nevnir, at m.a. Maurentsius Viðstein, sum eisini var limur, flutti fram røðu, og Jákup Dahl hevði føroyskað ein sálm, tá flaggið varð avdúkað. Hesin sálmurin stendur nú í sálmabókini.

Tað verður framvegis nýtt til fundir og onnur tiltøk í losjuni.



*Tað bláa flaggið frá 1933 er eisini at síggja á framsýningini. Tað hongur við síðuna av altjóða flagginum hjá felagsskapinum*





Sjálvtøkan í Hornabø er nú flutt innandura.
Hon er opin hvønn dag frá kl. 6.00 til kl. 24.00.
Gjaldskortið er lykil til dyrnar.
Øll gjaldskort kunnu nýtast.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

Ábyrgdar starvsfólk
til Hornið í SMS

Hornið í SMS sóknast eftir starvsfólki at byrja skjótast tilber.

Arbeiðstíðin er sett til 30-35 tímar um vikuna í dagtímunum, har uppgávan verður at hava ábyrgindina á ávísum økjum, søla og uppfylging.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og ábyrgdarfult starv við møguleikum til eitt fulltíðarstarv. Løn sambært galdandi sáttmála.

Umsóknir skulu sendast til Hornið innan 12. mai 2002.
Nærri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Jan Djurholm.

HORNIÐ
Hornið • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 50 10









*4 kvinnur eru valdar á ting — allar úr Suðurstreymoy. 3 av teimum 4 tingkvinnunum hava havt sæti á tingi seinastu 4 árini: Lisbeth L. Petersen, Sambandsflokkurin, Katrin Dahl Jacobsen, Javnaðarflokkurin og Annita á Fríðriksmørk, Tjóðveldisflokkurin. Fjórða tingkvinnan er Krisina Háfoss úr Tjóðveldisflokkinum*

# Javnstøðunevndin gjørt upp

**20,6%, av teimum, sum stillaðu upp til hetta Løgtingsvalið, vóru kvinnur og tær fingu 21,2% av persónligu atkvøðunum. Soleiðis hevur gongdin verið, síðani 1980 og kann hugsast, at um á leið 50% av valevnunum eru kvinnur, verða atkvøðurnar eisini á leið 50%**

TÍÐINDASKRIV

Hóast kvinnurnar fingu fleiri atkvøður bæði í prosenti og tali enn við undanfarna val, eydnaðist ikki hesaferð at fáa fleiri kvinnur valdar á ting. Bert 4 kvinnur vórðu valdar og stillaðu allar upp í Suðurstreymoy.

Kvinnurnar úti um landið eru sostatt ikki við til at manna okkara ting, og er hetta harmiligt.

Valið hesaferð vísti tó, at kvinnurnar fáa á leið tað %-býtið av atkvøðum, sum tær stilla upp við. 20,6% stillaðu upp til hetta Løgtingsvalið og tær fingu 21,2% av persónligu atkvøðunum. Soleiðis hevur gongdin verið, síðani 1980 og kann hugsast, at um á leið 50% av valevnunum eru kvinnur, verða atkvøðurnar eisini á leið 50%.

Týdningarmikið er tí støðugt at arbeiða fyri, at fleiri kvinnur koma á valevnislistarnar. Her hava floksleiðslurnar eina stóra ábyrgd og somuleiðis ta almenna Føroyar, sum skal tryggja fólkinum góðar karmar at virka undir. Eisini kvinnurnar sjálvar mugu bjóða seg fram og harvið vera við til at tryggja javna umboðan á tingi.

Atkvøðurnar til Løgtingsvalið eru nú taldar og úrslitið er greitt. Javnstøðunevndin ynskir valevnum og veljarum tillukku við valinum.

## 4 kvinnur valdar á ting

Hyggja vit at talinum av kvinnuligum tinglimum, er støðan óbroytt síðani seinasta val. Tó vóru 48 uppstillaðar í mun til 51 við seinasta val og er hetta í prosentum ein øking frá 7,8% upp í 8,3%

4 kvinnur eru valdar á ting — allar úr Suðurstreymoy. 3 av teimum 4 tingkvinnunum hava havt sæti á tingi seinastu 4 árini: Lisbeth L. Petersen, Sambandsflokkurin, Katrin Dahl Jacobsen, Javnaðarflokkurin og Annita á Fríðriksmørk, Tjóðveldisflokkurin. Fjórða tingkvinnan er Krisina Háfoss úr Tjóðveldisflokkinum.

## Atkvøðuslúkarir í Suðurstreymoy

Allar fýra kvinnurnar eru millum tey 15 valevnini, sum fingu flestar atkvøður í landinum. Lisbeth L. Petersen gjørdist nr eitt, Katrin Dahl Jacobsen gjørdist nr. 6, Annita á Fríðriksmørk nr. 11 og Kristina Háfoss nr. 14.

Kvinnurnar fingu umleið ein triðing av øllum persónligu atkvøðunum á Topp 15-listanum fyri landið. Hetta má sigast at vera eitt gott úrslit, tá hugsað verður um, at formenninir í 5 teimum størstu flokkunum vóru nr. 1-5 og bert ein kvinna er floksformaður.

## Fyrstvaldar

Tvær av nýggju tingkvinnunum gjørdust fyrstvaldar: Lisbeth L. Petersen gjørdist stóri persónligi vinnarin á valinum og fekk 1395 atkvøður. Katrin Dahl Jacobsen var fyrstvald í Suðurstreymoy og nr. 2 hjá Javnaðarflokkinum á Topp 15-listanum. Hon fekk 458 atkvøður. Annita á Fríðriksmørk var næstvald á ting og fekk 409 persónligar atkvøður og Kristina Háfoss varð triðjavald og fekk 362 atkvøður.

## Kvinnurnar í Norðoyggjum

Í Norðoyggjum vóru 5 kvinnur millum tey 15 valevni, sum fingu flestar persónligar atkvøður. Mamy Dahl Sørensen, Javnaðarflokkurin, fekk 177 atkvøður og er hetta næstflestar á Javnaðarlistanum. Hon er nr 7 á listanum yvir tey 15 valevnini, sum fingu flestar atkvøður. Olga Biskupstø, Tjóðveldisflokkurin, er nr. 10 á listanum og fekk 98 atkvøður og gjørdist nr. 3 á listanum.

Rúna Sivertsen, Fólkaflokkurin, er nr. 12 á listanum og fekk 95. Hon gjørdist nr. 4 á flokslistanum í Norðoyggjum. Erikka Eltør gjørdist nr 13 við 79 atkvøðum og gjørdist næstvald á listanum hjá Sambandsflokkinum. Eyðgunn Samuelsen, Javnaðarflokkurin gjørdist nr. 14 við 72 atkvøðum og nr. 4 á listanum.

## Kvinnurnar í Eysturoynni

Hallbjørg Hansen, Tjóðveldisflokkurin, og Edva Jacobsen, Sambandsflokkurin, eru báðar næst- og triðjvaldar í teirra flokki og fingu ávikavist 208 og 198 atkvøður. Tær eru nr. 7 og 8 millum tey 15 valevnir, sum fingu flestar persónligar atkvøður í Eysturoynni.

## Kvinnan í Sandoynni

Eydna Vidtfeldt, Sambandsflokkurin, fekk flestar atkvøður í sínum flokki — 61 í tali og er nr. 7 á listanum yvir tey fólk, sum fingu flestar persónligar atkvøður í oynni.

## Kvinnan í Norðstreymoy

Tann kvinnan, sum kláraði seg best í Norðstreymoy var Gunnvá Mortensen, Javnaðarflokkurin, sum var nr 12 millum tey 15 valevnini, sum fingu flestar atkvøður. Hon fekk 60 atkvøður og var nr. 3 av 4 valevnum hjá Javnaðarflokkinum.

## Kvinnurnar í Vágunum

Sólfríð Fjallsbak, Tjóðveldisflokkurin í Vágunum, fekk flestar atkvøður í flokkinum og vóru hesar 114 í tali. Hon er nr. 5 á listanum yvir tey 15 valevnir, sum fingu flestar atkvøður. Malan Helgadóttir, Javnaðarflokkurin, er nr. 9 við 59 atkvøðum.

## Kvinnan í Suðuroy

Marjun Olsen, Sambandsflokkurin í Suðuroy, fekk 75 atkvøður og varð nr. 15 á listanum yvir tey 15 valevnini, sum fingu flestar persónligar atkvøður. Á flokslistanum gjørdist hon nr. 5.

Kvinnurnar í Norðstreymoy, Vágunum og í Suðuroy eru ikki væl umboðaðar og sæst hetta aftur i prosentpartinum av samlaðu atkvøðunum.

## At enda

Um nøkur munagóð broyting skal spyrjast burturúr til næsta Løgtingsval og fleiri kvinnur skulu koma á ting, so býtið millum kvinnur og menn verður javnari, er umráðandi støðugt at arbeiða fyri, at fleiri kvinnur koma á valevnislistarnar. Her hava floksleiðslurnar eina stóra ábyrgd og somuleiðis ta almenna Føroyar, sum skal tryggja fólkinum góðar karmar at virka undir. Eisini kvinnurnar sjálvar mugu bjóða seg fram og harvið vera við til at tryggja javna umboðan á tingi.





SEIKO THE GREAT BLUE 3'arin · SMS, postboks 1057 · FR-100 Tórshavn · Tlf.: 35 35 35